# Grand-Prix í Badminton

**Seinasta umfarið í Grand-Prix kappingini í einamansleiki fyri vaksin í badminton varð leikt fyri góðari viku síðani**

BADMINTON
*tíðindaskriv*

Sunnudagin, 8. apríl, leiktu tey vaksnu seinasta umfarið í einmansleiki í Grand-Prix kappingini í hesum kappingarárinum.

Hetta seinasta umfarið varð leikt á Giljanesi, men annars hava seks kappingar verið ígjøgnum árið, har leikararnir hava havt møguleika at savna sær stig. Nú er so komið á mál við hesum kappingum, og niðanfyri prenta vit nøvnini á teimum trimum, sum vórðu fremst hjá ávíkavist kvinnum og monnum.

Komandi vikuskifti, 21. apríl, verður FM í A-røðini, meðan FM í meistara-bólkinum verður hildið 28. og 29. apríl

kvinnur
1 Guri Poulsen, HBF
2 Guðrun Jacobsen, HBF
3 Kristianna Thorkildshøj, HBF

menn
1 Erland Poulsen, HBF
2 Aksel Poulsen, HBF
3 Bjartur Lamhauge, HBF



*Guri Poulsen úr HBF var tann av kvinnunm, sum fekk savnað flest stig ígjøgnum Grand-Prix kappingarnar hetta kappingarárið*



*Grand-Prix vinnari hjá monnum 2000/2001 gjørdist Erland Poulsen úr HBF*

Kappingin um Løgmanssteypið

# Úrslit og støður í steypakappingini í fótbólti

**Í blaðnum í gjár var tíverri ikki rúmd fyri úrslitum og stigatalvum fyri bólkaspælið í kappingini um Løgmanssteypið. Hesi verða ístaðin prentað niðanfyri saman við yvirlitið yvir bestu málskjúttarnar higartil í kappingini.**

**Úrslit:**

Skírishósdag, 12. apríl
Bólkur 1
B68-ÍF 2-0
B71-KÍ 1-2

Bólkur 2
HB-TB 1-0
GÍ-B36 4-1

Bólkur 3
FSV-VB 0-2
NSÍ-EB/S 2-0

Leygardagin, 14. apríl
Bólkur 1
B71-B68 0-2
KÍ-ÍF 4-1

Bólkur 2
B36-HB 1-1
GÍ-TB 7-1

Bólkur 3
NSÍ-VB 2-1
EB/S-FSV 1-0

2. páskadag, 16. apríl
B68-KÍ 1-1
ÍF-B71 4-2

Bólkur 2
HB-GÍ 4-2
TB-B36 1-2

Bólkur 3
FSV-EB/S 1-1
VB-NSÍ 1-2

**Støðan í ymsu bólkunum er nú hendan:**

Bólkur 1

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 6 | 4 - 1 - 1 | 12 | 4 | 8 | 13 |
| 2 | B68 | 5 | 4 - 1 - 0 | 8 | 2 | 6 | 13 |
| 3 | ÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 9 | 11 | -2 | 6 |
| 4 | B71 | 5 | 0 - 0 - 5 | 3 | 15 | -12 | 0 |

Bólkur 2

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 6 | 4 - 2 - 0 | 24 | 8 | 16 | 14 |
| 2 | GÍ | 6 | 3 - 1 - 2 | 23 | 12 | 11 | 10 |
| 3 | B36 | 6 | 2 - 3 - 1 | 14 | 9 | 5 | 9 |
| 4 | TB | 6 | 0 - 0 - 6 | 6 | 38 | -32 | 0 |

Bólkur 3

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 5 | 5 - 0 - 0 | 13 | 4 | 9 | 15 |
| 2 | VB | 6 | 4 - 0 - 2 | 17 | 6 | 11 | 12 |
| 3 | EB/Streymur | 6 | 1 - 1 - 4 | 3 | 13 | -10 | 4 |
| 4 | FS Vágar | | 5 0 - 1 - | 4 | 4 | 14 | -10 |

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 8 |
| Palli Augustinussen | VB | 6 |
| Helgi L. Petersen | GÍ | 5 |
| Bárður Mortansson | HB | 5 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 5 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 5 |
| Heini Heinason | ÍF | 4 |
| Ove Nysted | KÍ | 4 |
| Krzystof Popczynski | VB | 4 |
| Jákup á Borg | B36 | 3 |
| John Petersen | B36 | 3 |
| Mortan Hansen | B68 | 3 |
| Áslakur Petersen | GÍ | 3 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 3 |
| Óli Hansen | GÍ | 3 |
| Uni Arge | HB | 3 |



## Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærarum at byrja á Fiskivinnuskúlanum 1. august 2001 í hesum lærugreinum:

**Kunningartøkni á B-stigi (4 t/v) og Virkisbúskapi á B-stigi (6 t/v)**

Søkt verður eisini eftir avloysara frá 1. august til 12. oktober 2001 í:

**Matvøruframleiðslutøkni á B-stigi (4 t/v) og Matvørulæru á A-stigi (6 t/v)**

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Tímarnir verða løntir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara um lærarar á Fiskivinnuskúlanum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella frá Mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 3. mai 2001.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna — tlf. 424 573
Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Frá 1. aug. 2001 er eitt 1/2 ársvikariat (august-desember) leyst at søkja í lærugreinunum

**donskum og týskum.**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: **Mads A. Winther, Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektanum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2001.

## Skrivstovufólk til Runavíkar Kommunuskúla

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Runavíkar Kommunuskúla at arbeiða hálva tíð.

Arbeiðið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarin skal hava royndir í skrivstovuyrkinum, duga væl føroyskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið verður at seta 15. mai, ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran Ásmund Lamhauge á tlf. 447331.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsing um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum, skal vera Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 02/05-2001.

RUNAVÍKAR KOMMUNA.
**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur
600 Saltangará

SK

## Frá S&K-felagnum

Treytað av nóg góðari undirtøku, verður skipað fyri skeiðnum
**Sálarfrøði og Tænasta**
15., 17., 22. og 29. mai 2001
hvønn dag frá kl. 16.00–20.00.

Skeiðið verður hildið á Føroya Handilsskúla og lærari verður Bergur Godtfred.

**Tilmelding innan 30. apríl 2001**

**S&K-felagið**
tlf. 316837 · fax. 310451
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

## Bilur til sølu

**VW Transporter við last**
**2500 Diesel**
**Árg. 1996, koyrt 97.600 km**
**Sera væl røktur**



**kr. 128.000,- v/MVG**
**Lagalig fígging**
**útgjald t.d. 30.000,-**
**Restin, heilt niður í 2.600,- pr. mðr.**

**Bilfríðkan**
Velbastavegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 ella 21 73 00
BMW
FIAT
Sosialurin - 311820

## Tíðaravmarkað starv í Kvinnuhúsinum

Starvið er 30 tímar um vikuna. Starvstíðin kann byrja sum skjótast og fyribils fram til 15. oktober 2001.

Tann, sum verður settur, skal undir ávísing og í samstarvi við leiðaran taka á seg allar uppgávur, sum arbeiðið í Kvinnuhúsinum hevur við sær.

Arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar, m.a. samskifti við brúkarar av húsinum og við tær sjálvbodnu vaktirnar, skrivstovuarbeiði, praktiskt arbeiði o.a.

Umsøkjarin má duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiðstíðin er skiftandi, tó oftast gerandisdagar millum kl. 10 og 17.

Umsóknarfreistin er hósdagin 3. mai 2001.

Nærri fæst at vita um setanarviðurskifti o.a. hjá leiðaranum í Kvinnuhúsinum.

Skrivlig umsókn við neyðugum upplýsingum um starvsroyndir o.t. verður at senda til:

**Kvinnuhúsið**
Postsmoga 1178
FO-110 Tórshavn
Tlf. 317200 · Fax 313243
Teldupostur: kvinhusi@post.olivant.fo

## Sky digital og Orbit Network.

**Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.**

**Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.**

**Sjálvandi tann tryggasta loysnin.**

**Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf 421411 ella 255328**




**Fígging kann útvegast**

Visti tú ikki tað? Sosialurin